# Váryvirlitstroling – Føroyabanki

**Magnus Heinason, túrur nr. 2112**
**Tíðarskeið: 17-24/3 2021**
**Ábyrgd:** Hannipoula Olsen



**Endamál:** *Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnmetingunum av toski, hýsu og upsa og møguliga øðrum fiskasløgum á Føroyabanka. Harumframt skuldu hydrografistøðir takast at fáa sjógvsýni til e-DNA verkætlan hjá Havstovuni.*

---


## Samandráttur

Hetta var triði og seinasti túrurin av váryvirlitstrolingunum í ár, samstundis sum hetta var seinasti túrurin hjá Magnusi Heinasyni eftir samfull 41 ár sum rannsóknarskip hjá Havstovuni. Íalt vóru 52 hydrografi- og trolstøðir tiknar, harav vóru 50 góðkendar við 27 tovum og 23 CTD (17 til e-DNA) umframt 8 glúpprøvar. Í tovunum vóru skásett 30 fiskasløg. Aftur í ár var væl meira av toski at fáa á Føroyabanka enn seinastu vártúrarnar undantikið í fjør (sí Mynd 2, Talvu 1). Hetta var bert stórur, vælvaksin og nærum gýtandi toskur, har nógv tann størsta nøgdin varð fingin í einum støkum háli. Nógv var at fáa av hýsu, bæði stórari og smáari. Nøgdirnar av upsa vóru á sama stigi sum undanfarin ár. Nebbasild stóð í trolmeskunum á flestu trolstøðunum, og magakanningarnar vístu, at væl var etið av nebbasild.









*Mynd 1. Løtumyndir á túrinum. A) Megnar toskahálið,  b) Fullur pavnur, c) Nebbasild úr toskamaga.*

### Um túrin

Vit fóru av Havnini klokkan 21:15 mikukvøldið 17. mars. Vit tóku glúp í Skopunarfirði á veg út á Føroyabanka og nýttu høvið at royna CTDina, eftirsum øll hydrografiútgerðin júst var flutt yvir av Jákupi Sverra. Vit byrjaðu at taka grynstu støðirnar uppi á Bankanum hósmorgunin, meðan veðrið var til vildar. Síðani tóku vit støðirnar á norður-eystur síðuni, norðanfyri og vestanfyri um vikuskiftið. Veðrið var heilt hampuligt allan túrin uttan síðsta dagin, tá vit bert fingu eitt hál, og endaðu túrin vegna veður. Tá vóru tvær trolstøðir og 3 hydrografistøðir eftir á Føroyabanka, eins og hydrografistøðin nr. V05 í Bankarennuni, har hitamátararnir skuldu niður við CTDini at kalibrerast. Vit komu inn í Nólsoyarfjørð týskvøldið kl. 18 at kroka, og landaðu mikumorgunin kl. 8.00, áðrenn Magnus Heinason varð lagdur.

### Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin) og kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3). Sjógvsýnini til e-DNA vóru filterað umborð og skulu sekvenserast í landi seinni í ár.

### Reiðskapur

116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og vanliga grunnin (16”-16”). Steinsham lemmar. 60 m breitlar. Starmon-oddi temperatur- og dýpdarmátarar festir á høvuðlínuni. CTD á rosettu við niskinfløskum. WP2 glúpar á 200 µm og 100 µm meskavídd.

### Viðmerkingar

Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar og í excel fílu.

### Fólk við frá Havstovuni

Hannipoula Olsen (kanningarleiðari)
Regin Kristiansen, Poul Vestergaard, Durita Sørensen og Ian Salter.




*Mynd 2. Myndin vísir nøgd (kg pr. tíma) av toski, hýsu og upsa á váryvirlitstúrinum á Føroyabanka frá 1983 til 2021.*

*Talva 1. Veiða í kg, veiða um tíman, nytrur og magar.*

| Fiskaslag | Kg í alt | KG/tíma | Nytrur | Magar |
|---|---|---|---|---|
| Hýsa | 19793.029 | 733.08 | 442 | 98 |
| Toskur | 9419.263 | 348.86 | 197 | 34 |
| Havmús | 1506.999 | 55.81 | | |
| Upsi | 776.347 | 28.75 | 73 | 26 |
| Longa | 367.085 | 13.60 | 63 | 5 |
| Lítli kongafiskur | 347.720 | 12.88 | | |
| Svartkjaftur | 204.761 | 7.58 | | |
| Gulllaksur | 156.451 | 5.79 | 20 | 3 |
| Mathøgguslokkur | 125.849 | 4.66 | | |
| Havtaska | 80.237 | 2.97 | | |
| Hvítingur | 63.868 | 2.37 | | |
| Glýsufiskur | 60.117 | 2.23 | | |
| Knurrhani | 55.783 | 2.07 | | |
| Silvur murtur | 47.901 | 1.77 | | |
| Hvítingsbróður | 45.723 | 1.69 | | |
| Skøta (*R. batis*) | 26.950 | 1.00 | | |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 14.019 | 0.52 | | |
| Agnhøgguslokkur | 11.520 | 0.43 | | |
| Brosma | 10.115 | 0.37 | 5 | 2 |
| Skaddur fiskur | 6.979 | 0.26 | | |
| Glaskvoysa | 6.151 | 0.23 | | |
| Tunga | 4.141 | 0.15 | | |
| Sjónota | 3.151 | 0.12 | | |
| Nebbaskøta | 2.650 | 0.10 | | |
| Stóri kongafiskur | 2.514 | 0.09 | | |
| Korall (*Lophelia*) | 2.500 | 0.09 | | |
| Nebbasild (*spp.*) | 2.014 | 0.07 | | |
| Reyði knurrhani | 1.743 | 0.06 | | |
| Blálonga | 1.485 | 0.06 | 3 | 2 |
| Iguker | 0.244 | 0.01 | | |
| **Íalt** | **33147.309** | **1227.68** | **803** | **170** |